# Byrjað í seinasta lagi á jóansøku

**Ætlaða djúphavnin í Vági má nú projekterast av nýggjum, men ætlanin er at fara undir sjálvt arbeiðið í seinasta lagi á jóansøku**

HAVNAGERÐ
*Áki Bertholdsen*



*Arbeiðið at gera djúphavn i Vági má nú fyrireikast av nýggjum, men tað verður arbeitt við tí og tað kann bjóðast í mars ella apríl*

**Vágur:** Arbeiðið at gera eina djúphavn í Vági, má nú projekterast av nýggjum.

Tað er avleiðingin av, at Løgtingið í síðstu løtu samtykti at sleppa ætlanini at gera eina samferðsluhavn í Vági í sambandi við djúphavnina.

Men arbeiðið at projektera havnina av nýggjum verður nú fyrireikað.

Jógvan Krosslá, borgarstjóri í Vági, sigur, at Landsbyggifelagið er farið í holt við at fyrireika arbeiðið av nýggjum, har talan verður um eina djúphavn burturav.

Hann sigur, at eftir ætlan fær kommunan eitt uppskot og metingar miðskeiðis í februar. Hann væntar tí, at nýggja havnin kann projekterast í vár og hann sigur, at í seinasta lagi á jóansøku skuldi verið klárt at farið undir sjálvt arbeiðið.

Men hesuferð verður talan um eina heilt aðra havn enn hugsað var um, tá ið djúphavnin eisini var upp á tal.

– Tá var talan um eina djúp- og samferðsluhavn fyri yvir 30 milliónir. Nú verður talan um eina djúphavn burturav fyri einar 16-20 milliónir.

Kortini fer kommunan at gera ein ferjuskráa í havnini, so at tað ber til hjá skipum við portri at leggja at, men talan verður ikku um nakra samferðsluhavn.

Djúphavnin verður 10 metrar djúp og talan verður um góðar 80 metrar av atløgubryggju eftir teirri longu síðuni og góðar 60 metrar av atløgubryggju út og inn.

Løgtingið hevur samtykt at veita helvtina av byggikostnaðinum í studningi, tó í mesta lagi 18 milliónir til eina samferðsluhavn og djúphavn.

Men Landsstýrið er sinnað at betala helvtina av tí, sum hetta minna projektið kostar, tað verða einar 8-10 milliónir í landsins part.

Í ár hevur Løgtingið samtykt at stuðla við fimm milliónum og tær verða brúktar í ár.

Grótið til havnalagið verður tikið úr Lopransdali, har grótið, sum er sprongt úr Sumbiarbergholinum, er goymt.

## Nýggir skoðarar

**Vágur:** Vágs býráð hevur nú valt nýggja vatn- og hegnsýnisnevnd. Á býráðsfundinum mikukvøldið, varð upplýst, at teir tríggir nevndarlimirnir í Vatn- og hegnsýnisnevndini, Bjarti Ludvig, Magnus Jacobsen og Poul Arni Thomsen, høvdu sagt seg frá.

Í nýggju vatn- og hegnsýnisnevndina vórðu valdir John Petersen, Herman Christiansenog Juul Sundberg

# Samgongan í Vágs býráð bæði víðkað og skrædnað

**Uttanflokkalistin er nú komin uppí samgonguna, men afturfyri føldi annar javnaðarmaðurin í býráðnum seg tvingaðan til at fara í andstøðu**

BÝRÁÐSPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*



*Teir báðir býráðslimirnir hjá uttanflokkalistanum eru nú eisini við í býráðssamgonguni í Vági. F.v. eru tað Poul Johannus Joensen, sum tók sæti í tveimum frá Eyðfinn Mørk og Sølvi Andreasen, sum er forðmaður í nýstovnaðu sosialu nevnd hjá býráðnum*

**Vágur:** Samgongan í Vágs Býráð er broytt.

Tað hendi á býráðsfundi mikukvøldið, har tað gjørdust greitt, at samgongan í Vágs Býráð varð víðkað, so at hon nú umfatar allar flokkar.

Men samstundis er tað mangt sum bendir á, at hon eisini skrædnaði tí tann eini býráðslimurin hjá javnaðarflokkinum vildi ikki góðtaka broytingarnar.

Fýra flokkar eru umboðaðir í Vágs Býráð: Tjóðveldisflokkurin við fýra býráðslimum, javnaðarflokkurin við tveimum, sambandsflokkurin við einum og uttanflokkalistin við tveimum.

Higartil hava allir flokkar verið í samgongu uttan teir báðir uttanflokkalimirnir. Men nú eru Sølvi Andreasen og Poul Johannus Joensen á uttanflokkalistanum eisini komnir upp í samgonguna og sostatt var ætlanin, at alt býráðið skuldi vera í samgongu og at ongin andstøða skuldi vera.

Jógvan Krosslá, borgarstjóri, segði, at samstarvið í býráðnum hevði verið so gott, eisini við teir báðar uttanflokkalimirnar, at hann sá onga orsøk vera til at ikki teir eisini skuldu koma upp í samgonguna.

Tað hendir eftir at Vágs Býráð nú eisini hevur skipað eina sosiala nevnd, at uttanflokkalistin kemur upp í samgonguna.

Samstundis fær uttanflokkalistin formannin í Sosialau nevnd.

Harumframt varð neyðugt at skipa hinar stóru nevndirnar hjábýráðnum av nýggjum.

Og tað merkti at tann eini býráðslimurin hjá javnaðarflokkinum, Eyðfinn Mørk, misti teir báðar mest týðandi nevndarsessirnar, hann hevði. Tað vóru nevndarsessirnar í teknisku nevnd og í havnanevndini.

Sostatt er Eyðfinn Mørk nú bara limur í Kirkjugarðsnevndini og í ferðslunevndini, men harumframt er hann eisini varaborgarstjóri.

Tað var hann so vónbrotin av, at hann vildi ikki skriva undir tað nýggju semjuna, uttan so, at hann í minsta lagi varðveitti limaskapin í havnanevndini.

Slapp hann ikki tað, føldi hann seg tvingaðan at fara í andstøðu, segði hann.

Býráðið atkvøddi síðani um, hvør skuldi vera limur í havnanevndini, og har fekk Eyðfinn Mørk bara eina atkvøðu og varð sostatt ikki valdur.

Eftir at nevndirnar hjá býráðnum eru skipaðar av nýggjum, hevur Poul Johannus Joensen úr uttanflokkalistanum tikið sætið í bæði havnanevndini og teknisku nevnd fyri Eyðfinn Mørk og Sølvi Andreasen, eisini úr uttanflokkalistanum, er blivin formaður í nýskipaðu sosialu nevnd.

Eyðfinn Mørk verður undir øllum umstøðum verandi varaborgarstjóri og limur í ferðslunevndini og kirkjugarðsnevndini.

Tær stóru nevndinar í Vágs Býráð eru nú soleiðis mannaðar:

Fíggjarnevnd:
Jógvan Krosslá, formaður
Páll Augustinussen
Ásgerð Stenberg

Tekniska nevnd
Dánjal Bjarkhamar, formaður
Mortan Mortensen
Poul Johhannus Joensen

Havnanevndin
Páll Augustinussen, formaður
Mortan Mortensen
Poul Johannus Joensen

Mentanarnevndin
Ásgerð Stenberg, formaður
Thurid Kjærbo
Mortan Mortensen

Sosiala nevnd
Sølvi Andreassen, formaður
Thurid Kjærbo
Ásgerð Stenberg

Brunanevndin
Jógvan Krosslá, formaður
Páll Augustinussen
Ásgerð Stenberg



# Kvinnur undrast á harðskapsdóm



*Fýra hamarasløg í høvdið góvu níggju mánaðir. Tað er lítið, sigur Kvinnuhúsið, sum heldur kvinnur vera illa vardar í rættarskipanini*

*Modelmynd: Jens Kr. Vang*

**Kvinnur eru illa vardar í rættarskipanini, sum ofta tekur størri atlit til rættartrygdina hjá tí ákærda enn harðskapsoffrinum. Tað heldur Elin Reinert Planck, leiðari á Kvinnuhúsinum. Dómurin í hamaramálinum virkar alt ov linur og vísir, hvussu veikar kvinnur standa í harðskapsmálum, sigur hon**

KVINNUMÁL
*Ingi Rasmussen*

Rætturin tekur ofta størri altit til harðskapsmannin enn til offrið.

Tað er niðurstøðan hjá Kvinnuhúsinum eftir enn ein dóm í Føroya rætti, har ein kvinna hevur staðið fram og hevur meldað sín mann fyri grovan harðskap. Týsdagin fekk maðurin dóm í níggju mánaðir.

– Eg haldi, sum fólk flest, at hetta er øgiliga lítið fyri so grovan harðskap. Haraftúrat undrar tað meg stórliga, at tað ikki verður tikið við í dómin, at hann hevur viðgingið á løgreglustøðini, at hann ætlaði at drepa hana. Hann sleppur undan, tí rætturin helt tað ikki vera prógvað, og tað ljóðar heilt órímiligt fyri okkum, sigur Elin Reinert Planck, leiðari á Kvinnuhúsinum.

### Ongin drápsroynd

Maðurin slerdi kvinnuna fýra ferðir í høvdið við einum hamara. Eina ferð í tinningina, tvær ferðir aftan fyri og eina ferð mitt á høvdið. Fyrstu ferðina helt hann kvinnuni, sum hann livdi saman við, fasta niður ímóti gólvinum og slerdi beint ímóti pannuni. Men hon fekk tíbetur armin fyri. Slagið var so hart, at armurin brotnaði.

Hetta eru fakta í málinum um ein 48 ára gamlan mann, sum fór so illa við 49 ára gomlu kvinnuni, hann livdi saman við, at hon sambært læknunum mundi doyð av løstunum.

Lukkutíð slapp kvinnan til rýmingar. Tá maðurin var avhoyrdur á politistøðini viðgekk hann, at hann ætlaði at drepa hana. Men í grundlógaravhoyringini broytti hann støðu og viðgekk bara, at hann hevði verið harðligur.

Drápsroynd? Nei, helt dómarin. Tí maðurin skal hava hugsað ígjøgnum, at hann ætlaði at drepa kvinnuna og skal hava kent møguligu fylgjurnar av sínari handling.

### Tann ákærdi vardur

Elin Reinert Planck heldur, at níggju mánaðir fyri at hava sligið ein hamara fleiri ferðir í høvdið á eini kvinnu, er væl ótrúliga sloppið. Serliga um samanborið verður við onnur lógarbrot. Hevði hann stolið pengar í Føroya Banka, var revsingin ein heilt onnur.

– Tað er ongin proportión millum ymsar revsingar, og harðskapur, har kvinnur tíverri oftast eru offur, verður mettur alt ov lágt, sigur Elin Reinert Planck.

Hon heldur yvirhøvur, at kvinnur standa veikar í rættinum og vísir í somu vending til neyðtøkumálið í Keypmannahavn, har ein føroysk kvinna tapti eitt rættarmál ímóti fimm monnum, har ein maður síðan varð dømdur í einum øðrum máli um hópneyðtøku.

– Tey kvinnumálini, sum hava verið, vísa, hvussu torført tað er at føra prógv í rættinum. Tað virkar ógvuliga løgið, tá man sær málini uttanífrá, at dómurin ikki verður hareftir, sigur hon.

Rættarskipanin átti at verið skrúvað øðrvísi saman, so tað vóru offrini, sum vóru vard.

– Tað er tann ákærdi, sum er best vardur, vísir tað seg. Hansara rættindi í rættarskipanini telja meira enn offrini fyri harðskapi. Tann ákærda skal føra prógv fram, sum eru nærum ógjørlig at koma við. Tí undrar tað meg stórliga í hesum føri, at maðurin ikki fær dóm fyri drápsroynd, tá hann viðgongur tað í avhoyring. Tað er undrunarvert, at tað ikki kann brúkast sum prógv, sigur Elin Reinert Planck.

### Kjak neyðugt

Tíðin er komin, at føroyingar taka eitt kjak um hesi viðurskiftini, heldur leiðarin í Kvinnuhúsinum. Tað kann ikki vera rætt, at kvinnur aftra seg við at melda grovan harðskap, tí tær ikki verða tiknar fyri fult.

– Um vit skulu hava okkara egna lógarverk, sum sagt verður, so haldi eg avgjørt, at vit eiga at taka eitt kjak um hetta evni. Vit mugu hava eitt lógarverk, sum verjir øll, bæði tann ákærda, men sanniliga eisini tann, sum ákærir. Sum nú er, eru kvinnurnar illa vardar í rættarskipanini, sigur Elin Reinert Planck.

## Ákærin umhugsar at kæra dómin

HARÐSKAPUR
*Ingi Rasmussen*

– Nú fara vit fyrsta at lesa dómin nágreiniliga, og síðan taka vit støðu til, um vit kæra hann fyri Eystara landsrætt.

Tað sigur ákærin Linda Hesselberg tveir dagar eftir harðskapsdómin í Føroya rætti, sum fær nógva umrøðu millum fólk.

Ákæruvaldið vildi hava mannin dømdan fyri drápsroynd. Tað varð gjørt, tí tað varð staðfest í rættinum, at hann við vilja sleyg kvinnuna fýra ferðir í høvdið við hamaranum. Slapp hon ikki undan, hevði hon óivað doyð. Harafturat kemur, at maðurin á politistøðini viðgekk, at hann ætlaði at drepa kvinnuna.

– Hendan kombinatiónin gjørdi, at vit vildu hava hann dømdan fyri drápsroynd, sum kann geva nógv harðari dóm. Men dómarin helt tað ikki vera prógvað, at maðurin við vilja ætlaði at drepa, og tí bleiv dómurin nógv linari, sigur Linda Hesselberg.

Hon vil kortini ikki siga, um hon er vónsvikin. Tað er siðvenja at geva millum átta og tíggju mánaðir fyri harðskap, og hesin dómurin lá mitt ímillum.

Tá dómurin fall, gjørdi ákærin nógv burturúr, at maðurin ikki mátti setast leysur, áðrenn hann skuldi sita dómin.

– Eg helt tað hava stóran týdning, at hann ikki slapp leysur, so hann møguliga kundi hevna seg inn á kvinnuna. Hann sá hana ikki vitna, men hann hoyrdi hana. Og tá eg ikki kundi fáa hægri revsing, so bleiv tað avgerandi fyri meg, at tað gekk ein tíð, har hann kundi sissast, áðrenn hann kom nærhendis hana aftur, sigur Linda Hesselberg.

Helst gongur ein vika, áðrenn ákæruvaldið hevur tikið støðu til, um dómurin skal kærast til Eystara landsrætt.